Barnaverndarstova Føroya

# Vegleiðing til fakfólk at skriva fráboðan

Tann góða fráboðanin hevur stóran týdning fyri, at barnið so skjótt sum til ber kann fáa røttu hjálpina. Ein góð fráboðan gevur barnaverndartænastuni eitt gott grundarlag at meta um støðuna hjá barninum. Tí hevur tað stóran týdning og er ein hent hjálp hjá øllum, at fráboðanin hevur so neyvar upplýsingar sum til ber, og at tú grundar við dømum við dagfesting, hendingum, samanhangi og so framvegis.

Eingi krøv eru til longd, orðaval osfr. Tað týdningarmesta er, at tú boðar frá so tíðliga sum til ber, og at barnaverdartænastan fær at vita, hvat tú stúrir fyri, hvørja atferð, tú sært, og nær ein broyting er hend.

Les eisini bóklingin, *Børn hava rætt til eitt gott lív*.

Niðanfyri verður greitt frá, hvussu tú kanst skriva eina fráboðan til barnaverndartænastuna. Minst til at greiða frá tí, tú metir viðkomandi, eisini hóast tað møguliga ikki verður spurt her. Metir tú spurningar óviðkomandi, leyp teir um.

Umráðandi er, at fráboðanin er so frágreiðandi sum yvirhøvur til ber. Minst til at skilja sundur frágreiðing og meting.

Ikki skriva tína tulking av, hvussu støðurnar hanga saman. Hetta er til barnaverndartænastuna at meta um. Heldur ikki skalt tú gera uppskot til, hvørjar fyriskipanir barnaverndartænastan skal seta í verk. Tá tú sum fakpersónur hevur boðað frá, skalt tú halda fram at bjóða barninum stuðul og hjálp.

Vit mæla til, at fráboðanin er skrivlig.

## Fráboðan

**1. Hvønn snýr tað seg um**
- Navn, føðidato og bústaður hjá barni.
- Nøvn og bústaður hjá foreldrum og hvør hevur foreldramyndugleika.
- Telefonnummur hjá bæði foreldrum og barninum.

**2. Upplýsingar um barnið**
- Skúli/stovnur og upplýsing um hvussu leingi barnið hevur verið har.
- Floksstig.
- Navn á flokslærara / kontaktpersóni / flokstoymi.

**3. Hvør skrivar, og hvat er tín kunnleiki og samband við barnið**
- Greið frá, hvat títt samband við barnið er, og hvussu leingi tú hevur verið um tað.
- Hvussu treivst og kláraði barnið seg, áðrenn tú gjørdist stúrin?

**4. Orsøk til stúran**
- Nær gjørdist tú stúrin?
- Hví stúrir tú um trivnaðin og menningina hjá barninum – í stuttum.
- Hvørji tekin um mistrivnað hevur tú sæð?
- Hvat hevur barnið sagt frá?

**5. Eygleiðingar, frágreiðingar og dømi um barnið og familjuna**

- Lýs ítøkiliga, hvat við barninum fær teg at stúra? (Tað kann vera sosialt, fakliga, persónliga, grundleggjandi tørvir og annað. Gev gjarna dømi.)
- Hvat riggar væl hjá barninum og foreldrunum? (Tað kann vera sosialt, fakliga, persónliga, grundleggjandi tørvir o. a. Gev gjarna dømi.)
- Yvirskipað frágreiðing av fysisku, sálarligu og sosialu viðurskiftunum hjá barninum.
- Tú kanst skoyta uppí tína fakligu meting.

**6. Uppmøting hjá barninum**

- Upplýsingar um uppmøting ella fráveru í skúla/stovni.

**7. Hvussu hevur tú roynt at hjálpa?**

- Í hvønn mun hevur tú roynt at bøta um trupulleikarnar saman við foreldrunum?
- Hvørjar samrøður ella fundir hava tit havt?
- Hvat hevur verið sett í verk í skúla/stovni fyri at stuðla barninum?
- Hvørja ávirkan hevur hetta havt?

**8. Samstarv við foreldur**

- Hvussu riggar samstarvið við foreldrini?
- Eru serlig familjuviðurskifti sum til dømis skilnaður, sjúka, misnýtsla, arbeiðsloysi ella annað, sum eru viðkomandi?

**9. Hvussu eru foreldrini kunnað um hesa fráboðan?**

- Gev gætur! Í sambandi við harðskap/ágang ella illgruna um harðskap/ágang, framdur av foreldrunum, skalt tú IKKI kunna foreldrini, men umgangandi boða barnaverndartænastuni og/ella politinum frá!
- Í øllum øðrum førum greiðir tú frá, um foreldrini eru kunnað um ta fráboðan, ið tú sendir.
- Hava foreldrini lisið tað, tú hevur skrivað á einum fundi, ella hevur tú lisið hana upp fyri teimum í telefonini?
- Hvat vóru reaktiónirnar hjá foreldrunum upp á fráboðanina?
- Hava foreldrini havt høvi at skoyta sínar viðmerkingar uppí til fráboðanina?

**10. Aðrar týðandi/viðkomandi upplýsingar**

- Hevur tú aðra vitan um viðurskifti, sum hava týdning fyri trivnaðin og menningina hjá barninum?

**11. Nøvn á teimum sum boða frá, undirskrift og dagfesting**

- Áset navn og starvsheiti hjá tær sum fráboðara.
- Áset dagfesting.

**12. Send fráboðan til barnaverndartænastuna.**